# EYKA BÝRÁÐSFUNDUR

**Dagfesting:** 13.07.2016 kl. 19:00

Nevndarlimir:
Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Anna Brattaberg Samuelsen
Conrad Gaard Joensen
Dánjal Bjarkhamar
Heri Hjelm
Poul W. Augustinussen

Ikki møtt:
Eyðbritt Krosslá, fráboðað
Tórður Poulsen

Nevndarskrivari: Petry Joensen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 59/16 | 16/00121-7 | Leigusáttmálar fyri Hyttur við Laksá | 2 |
| 60/16 | 16/00156-3 | Umbøn um stuðul til ger av forprojekti til multihøll inni á Oyrunum í Vági | 3 |
| 61/16 | 16/00186-1 | Eykajáttan til yvirtøku av Vágs Ítr ráð | 4 |
| 62/16 | 16/00195-2 | Umsókn um at víðkað leiguøki undir Páls Høll matr. nr. 596h | 5 |
| 63/16 | 16/00197-2 | Umsókn um loyvið at byggja út Páls Høll | 6 |
| 64/16 | 16/00215-3 | Setan av leiðara til Musikkskúlan í Suðuroy | 7 |
| 65/16 | 16/00221-2 | Umbøn um játtan til víðari arbeiðið við Marghøllini | 8 |


Borgarstjórin boðar frá at málini viðv. Páls-høll, víðkan av leigu økið 62/16 og byggiloyvið 63/16 verða tikin av skránni og beind í nevndir aftur. Hesi málini koma fyri at býráðsfundum eftir summarferiuna. Býráðið tøk undir við hesum.

# 59/16 Leigusáttmálar fyri Hyttur við Laksá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 36/16 | 16/00121-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 73/16 | 16/00121-7 |
| 3 Vágs Býráð | 13.07.2016 | 59/16 | 16/00121-7 |

Peningastovnar sum skulu inn at fíggjar onkrar av gjørdu hyttunum hava vent sær til kommununa og víst á, at fyri at teir kunnu tinglýsa sítt pant í ognini, má ognin hava egið matrikulkort.
Eisini ásetur matrikullógin §15 at eigindómur ella ómatrikuleraður lutur kann ikki avhendast ella pantsetast fyri seg ella verða latin øðrum til brúks longur enn 10 ár, uttan so at matrikulmyndugleikin góðkennir sundurbýtið, so hesin partur verður frábýttur við egnum matr. nr..

Sambært Matrikulstovuni er møguligt at býta matrikulnummar 490d í 10 lutir (Matrikulkort), hetta kann gerast eftir at hvør hyttan hevur fingið serstakt húsanummar.

Viðfest er yvirlit yvir leigarar av luti á matr. nr. 490d, skotið verður upp at kommunan broytir øll leigumál til 10 ára longd og leggur allar leigusáttmálar fyri á fyrst komandi býráðsfundi.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við at fremja matrikuleringina, men hetta er ikki í áhuga fyri kommununa og verða eigarar sjálvir at gjalda fyri matrikuleringina.
Mælt verður til at leggja leigusáttmála fyri býráðið á komandi fundi og broyta leigutíðina til 10 ár.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 13. juli 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

# 60/16 Umbøn um stuðul til ger av forprojekti til multihøll inni á Oyrunum í Vági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 45/16 | 16/00156-3 |
| 2 Mentanarnevndin | 13.06.2016 | 55/16 | 16/00156-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 75/16 | 16/00156-3 |
| 4 Vágs Býráð | 13.07.2016 | 60/16 | 16/00156-3 |

Vágs Ítróttarráð hevur havt fund um ætlan at byggja multihøll inni á Oyrunum í Vági.

Í hesum sambandi hevur Vágs Ítróttarráð samtykt:

- at søkja Vágs kommunu um stuðul á í mesta lagi 200.000 kr. til at gera forprojekt í smb. multihøll inni á Oyrunum í Vági.

at søkja Vágs kommunu um prinsipielt byggiloyvið, tvs. biðja um økið inni á Oyrunum sum er umleið 5.000 $m^2$ støddar at byggja multihøllina á. (Vágs Ítróttarráð vil venda aftur til Vágs kommunu við endaligum byggitekningum vm., tá søkt verður um endaligt byggiloyvið.

Mentunarnevndin verður at taka støðu til partin viðv. at játta stuðul í mesta lagi 200.000 kr. til at gera forprojekt í smb. multihøll inni á Oyrunum í Vági

Heitt verður á limirnir í MN um at svara umvegis teldupost um tit taka undir við hesum, so verður málið staðfest á komandi fundi í nevndini.

Um Metnunarnevndin játtar umbidna stuðul, verður mælt til at hetta verður játtað av innistandandi.

Málið skal leggjast fyri býráðið og hava tvinnar viðgerðir. Borgarstjórin ynskir málið fyri á býráðsfundi 30. mai, og tí er neyðugt at avgreiða hetta umvegis teldupost.

Allir limirnir í Mentunarnevndini hava umvegis teldupost svara játtandi uppá, at tey taka undir við at veita umbidna stuðulin.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt.

**Mentanarnevndin 13. juni 2016:**
Samtykt at stuðla við kr. 200.000,-

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 13. juli 2016:**
Samtykt við 5 atkvøðum fyri, Conrad Gaard Joensen atkvøddi ímóti og Heri Hjelm atkvøddi ikki.

## 61/16 Eykajáttan til yvirtøku av Vágs Ítr ráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 78/16 | 16/00186-1 |
| 2 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 52/16 | 16/00186-1 |
| 3 Vágs Býráð | 13.07.2016 | 61/16 | 16/00186-1 |

Víst verður til mál 15/00236 har Býráðið tann 25.01.2016 samtykti at VÍ skuldi yvirtakast.

Lánið hjá VÍ (saldo kr 3.717.730,77) er tann 01.02.2016 flutt yvir á stóra lánið hjá kommununi, men enn er ongin játtan til yvirtøkuna.

Tí verður mælt til at játtað eykajáttan við lántøku á kr. 3.718.000 (avrundað). Enn eru tó formellu tingini ikki endalig, so sum virðismeting, tinglýsing osv

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at viðmæla hesum.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum, málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Vágs Býráð 13. juli 2016:**
Einmælt samtykt til seinnu viðgerð.

## 62/16 Umsókn um at víðkað leiguøki undir Páls Høll matr. nr. 596h

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 13.06.2016 | 23/16 | 16/00195-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 74/16 | 16/00195-2 |
| 3 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 55/16 | 16/00195-2 |
| 4 Vágs Býráð | 13.07.2016 | 62/16 | 16/00195-2 |

John Hendrik Holm hevur í telduposti 10. juni 2016 vegna grunnin Páls Høll søkt Vágs kommunu um at víðka leigu økið undir Páls Høll matr. nr. 596h inni á Oyrunum við góðum 500 fermetrum. Hetta grunda á tær útbyggingar sum liggja fyri framman.

**Havnanevndin 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Dennis Holm metti seg ógegnigan og var ikki við í viðgerðini. Eydis Kjærbo leiddi fundin í hesum málið.
Eydis Kjærbo vísti á, at grunnurin hevur tørv á at broyta útbyggingina nakað og tí verður arbeitt við at fáa gjørt nýggjar tekningar, og skjótur hon tí upp, at útseta málið soleiðis at býráðið hevur ítøkiliga uppskot at taka støðu til.
Býráðið samtykti einmælt at taka undir við at taka málið av skránni.

**Vágs Býráð 13. juli 2016:**
Málið beint aftur í nevnd.

## 63/16 Umsókn um loyvið at byggja út Páls Høll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 40/16 | 16/00197-2 |
| 2 Vágs Býráð | 13.07.2016 | 63/16 | 16/00197-2 |

Grunnurin handan Páls Høll hevur á býráðsfundi 23. mars 2016 lagt fram ætlanir um at útbyggja Páls Høll við einum baðilandi og víðkan av Fitness íalt áleið 500 fermetrar, søkt var eisini um at fáa broytt leigusáttmálan við Vágs kommunu samsvarandi hesum og við einum árligum gjaldið uppá 375.000,00 kr.. Vágs býráð hevur samtykti at taka undir við hesum.

Grunnurin handan Páls Høll ynskir at fara undir útbyggingina í summar 2016, og hevur heitt á Havnanevndina um at víðka leigaða økið við 500 fermetrum.
Eisini vil grunnurin biðja um byggiloyvið til ætlanina. Tekningarnar eri ikki heilt liðugar enn, men tað sæst av viðløgdu plan tekning hvussu ætlanin er at byggja út.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at útseta málið til endaligar tekningar fyriliggja.

**11. juli 2016:**
Vágs kommuna hevur 11. juli móttikið nýggjar tekningar av ynsktu útbygginini av Páls Høll.

**Vágs Býráð 13. juli 2016:**
Málið beint aftur í nevnd.

## 64/16 Setan av leiðara til Musikkskúlan í Suðuroy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Vágs Býráð | 13.07.2016 | 64/16 | 16/00215-3 |

Vágs kommuna hevur 5. juli 2016 móttikið teldupost frá Musikkskúlanevndini við áheitan um at taka til viðgerðar skjótast tilber, tilmælið um setan av leiðar til Musikkskúlan í Suðuroy.

Nevndin hevur lýst starvið leyst at søkja og var umsóknarfreistin úti 24. juni 2016.

Inn koma tríggjar umsóknir og Musikkskúlanevndin kom við innstilling til nr. 1, nr. 2 og nr. 3.

**Vágs Býráð 13. juli 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við innstillingini og seta Kára Jacobsen.

## 65/16 Umbøn um játtan til víðari arbeiðið við Marghøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 13.07.2016 | 65/16 | 16/00221-2 |

Fíggjarnevndin mælir til at játta 2 mió. kr. til Vágs Ítróttarráð, soleiðis at verkætlanin við marg-høll á Oyrinum kann byrja.

Játtanin førir við sær, at farast kann undir veruligu projekteringina og ein heilt greið kostnaðarmeting kann fáast til vega í seinasta lagi miðskeiðis í august 2016.

Í august verður so tikin støða til endaligu projektlýsingina. Fyribils kostnaðarmeting bendir á, at kostnaðurin ikki verður meiri enn 20 mió. kr. Tað er tó neyðugt at fáa greiða kostnaðarmeting, áðrenn farið verður undir at byggja.

**Vágs Býráð 13. juli 2016:**
Samtykt við 5 atkvøðum fyri, Conrad Gaard Joensen atkvøddi ímóti og Heri Hjelm atkvøddi ikki.
Hetta er at tulka sum ein eykajáttan av innistandandi og skal hava tvinnar viðgerðir.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Anna Brattaberg Samuelsen |
| Conrad Gaard Joensen | Dánjal Bjarkhamar | Heri Hjelm |
| Poul W. Augustinussen | Tórður Poulsen | Eyðbritt Krosslá |